Kommunufelagið

Streymar millum land og kommunur á mentanarøkinum í 2021

Í 2021 rindaðu kommunurnar umleið 22 mió. kr. í stuðli til mentamál (sí Talvu 1). Talan er um gjøld fyri næmingar á skúlanum á Trøðni, í frískúlum og eftirskúlum. Harumframt rinda kommunurnar 50% av musikkskúlalæraralønunum og 20% av útreiðslunum til lærlingaundirvísing.

Talva 1: Stuðul frá kommunum til Mentamál	
(mió. kr.)	**2022**
Skúlin á Trøðni	0,9
Lærlingaundirvísing	4,2
Musikkskúlalærarar	14,0
Eftirskúlar	0,3
Frískúlar	2,4
Tilsamans (mió. kr.)	**21,9**

Hinvegin fingu kommunurnar góðar 13 mió. kr. frá játtanini til § 7 mentamál í 2021 (sí Talvu 2). Talan er um stuðul til bókasøvn, bygdasøvn og skjalasøvn. Harumframt rindar landið 50% í stuðli til skúlabarnakoyring, og stuðlar eisini einum stórum parti av undirvísingini í kvøldskúlunum.

Talva 2: Stuðul frá Mentamál til kommunur	
(mió. kr.)	**2021**
Fólkabókasøvn	2,8
Kvøldskúlar	7,0
Skúlabarnaflutningur	1,9
Bygdasøvn	0,4
Skjalasøvn	1,0
Tilsamans (mió. kr.)	**13,2**

Tað er ikki einans innan mentamál, at nógvar flytingar eru millum landið og kommunurnar. Tær eru allastaðni á fíggjarlógini. Talan er ofta um gamlar ásetingar, sum kanska vóru skilagóðar í sínari tíð, men sum í dag hava lítlan og ongan fíggjarligan týdning. Gjaldstovan hevur ofta víst á, at hesir mongu peningastreymarnir millum landið og kommunurnar krevja munandi arbeiðsorku og eru ein støðug kelda til feilir og rættingar. Eisini Hagstovan hevur víst á, at mongu flytingarnar gera tað trupult at gera eina samlaða uppgerð fyri almenna geiran. Eisini má havast í huga, at hesar flytingar krevja nógva umsiting, bæði hjá landinum og hjá kommununum. Tað eru sostatt góðar orsøkir til at fáa ruddað upp í nøkrum av hesum flytingum.